# Uppskot: Veitarasáttmáli

**millum**
**Gjaldstovuna (Kundin) og**
**sp/f xxxxxx, v-tal xxxxxxx (Veitarin)**

| | |
|---|---|
| **Grundarlag** | Sáttmálin fevnir um uppgávur knýttar at forkanning um vitlíki á Gjaldstovuni.<br>Hesin sáttmálin er saman við útbjóðingartilfarinum grundarlagið undir samstarvinum. |
| | Kundin ger sáttmála við veitaran, har tað er <**NAVN Á RÁÐGEVA**> (Veitarin), ið fremur uppgávurnar. |
| **Ábyrgdarhavandi av sáttmálanum** | Nicolai Mohr Balle er ábyrgdarhavandi og leiðari fyri kundan og xxxxxxx er ábyrgdarhavandi fyri veitaran. |
| **Uppgávur hjá veitaranum (veitingin)** | Talan er um at gera eina forkanning, sum er nágreinilig lýst í útbjóðingartilfarinum. |
| **Arbeiðstíð og -staður** | Uppgávurnar skulu loysast í vanligari arbeiðstíð, um ikki annað er avtalað.<br>Veitarin avgerð sjálvur arbeiðsstaðin.<br>Møguligt skal vera at fáa fatur í veitaranum umvegis telefon og teldupost í vanligari arbeiðstíð. |
| **Góðska** | Tað verður væntað, at veitarin loysir uppgávurnar á einum stigi, sum roknað kann verða við frá einum veitara við tí bakgrund, útbúgving og royndum, ið veitarin hevur, sambært tilboðnum. |
| **Tímatakstur** | Ráðgevin verður løntur fyri sítt arbeiði sambært tilboðnum. |
| **Tíðarnýtsla og aktivitetir** | Veitarin skrásetur dagliga tímanýtslu og førir sokallaða logbók fyri høvuðsvirksemi.<br>Ráðgevin ger tímanýtslu upp hvønn mánað og sendir kundanum hana, saman við logbók.<br>Ábyrgdarhavandi av sáttmálanum fyri veitara og kunda gjøgnumganga og góðkenna tímanýtslu og logbók. |
| **Rokningar** | Veitarin sendir kundanum rokning eina ferð um mánaðin, har skjalfesting fyri tímar í tíðarskeiðinum er hjáløgd.<br>Treytin fyri útgjaldi er, at krøvini til skráseting av tíðarnýtslu eru lokin. Sí omanfyri.<br>Rokningin skal verða talgild í vanligum oio-xml formati. |
| **Trúnaður** | Báðir partar hava skyldu at viðgera vitan og tilfar um hvønn annan í trúnaði. |
| **Skyldur hjá kunda** | Kundin hevur skyldu at tryggja, at leiðsla og starvsfólk við hóskandi førleika veita hjálp, so veitarin kann loysa tær uppgávur, viðkomandi er settur at loysa.<br>Kundin hevur ábyrgd av at kunna viðkomandi partar og persónar um leiklutin hjá veitaranum, og tær uppgávur, sum avtala er gjørd um. |
| **Rættindi til tað útinta** | Kundin fær øll rættindi til tað, sum er útint av veitaranum í sambandi við henda sáttmála, umframt øll rættindi til at broyta, geva og menna víðari tað útinta, soleiðis sum kundin ynskir tað.<br>Tilfar, sum kundin hevur útflýggjað veitaranum, verður latið aftur, í seinasta lagi, tá ið sáttmálin fer úr gildi.<br>Kundin góðtekur at veitarin kann varðveita upplýsingar og vitan, sum veitarin nýtir at menna egið virksemi, tó soleiðis at hetta ikki brýtur avtaluna um rættindi og trúnað. |

| | |
|---|---|
| **At siga sáttmálan upp** | Sáttmálin kann sigast upp av báðum pørtum við skrivligari freist á 1 mánað. |
| **Mishald** | Við týðandi mishald av hesum sáttmála, kann sáttmálin slítast.<br><br>Dømi um týðandi mishald eru um veitarin:<br>- Ikki maktar uppgávurnar<br>- Ikki veitir góðsku sambært tilboðnum<br>- Ikki heldur avtalur |
| **Force majeure** | Vanligar reglur um force majeure eru galdandi fyri henda sáttmála. |
| **Ósemjur** | Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum.<br><br>Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmáli. Føroyskur rættur er galdandi. |
| **Gildistíð** | Sáttmálin kemur í gildi við undirskrift av báðum pørtum og er galdandi fram til og við 31. desember 2025. |
| **Optión** | Kundin kann leingja sáttmálan eina ferð 12 mánaðir (1 x 12). |
| **Uppathald** | Tá sáttmálatíðarskeiðið er runnið skal veitarin handa kundanum alt kundin eigur rættindi til. |
| **Undirskrift** | Fyri kundan<br>Navn: Nicolai Mohr Balle Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: ____________________________________________<br><br><br>Fyri veitaran<br>Navn: xxxxxx Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: ____________________________________________ |